## Føroyingar á NM

Kappingin um Norðurlendska meistaraskapin í Bridge er í løtuni í Lillehammer í Noregi. Úr Føroyum er opið lið við Boga Simonsen-Hallberg Arnfríðson og Heðin Mouritsen-Rói á Rógvu Joensen og kvinnulið við Henriettu Svenstrup-Jórun Johannesen og Majken Johansen-Súsannu Dam. Liðini fóru úr Føroyum mánamorgun og spældu tríggjar dystir ígjár. Ímóti Íslandi vann opna liðið 17-13 og kvinnurnar taptu 7-23. Móti Danmark taptu bæði liðini. Opna liðið 0-25 og kvinnurnar 4-25. Síðst varð spælt móti Noregi og tá vann opna liðið aftur 17-13 og kvinnurnar taptu tepurt 13-17



## Spæla 4-4-2

Tað er mest sum víst, at Skotland fer á vøllin við eini 4-4-2 uppstilling, har Barry Ferguson og Darren Fletcher fáa høvuðsleiklutirnar á miðvøllinum. Ætlandi verður uppstillingin hendan: Craig Gordon – Graham Alexander, David Weir, Stephen McManus, Gary Naysmith – Paul Hartley, Barry Ferguson, Darren Fletcher, Shaun Maloney – Kris Boyd, Garry O'Connor




*Skuldi nakar ivast, um skotar eisini búleikast á Hotel Tórshavn, so er hetta væl prógv fyri, at so er*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Á Tinghúsvøllin høvdu skotsku fjeppararnir, Tartan Army, lagt eitt veldugt flagg, sum var 10 X 20 metrar til støddar. Eisini onnur skotsk fløgg vóru at síggja*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Hertóku Havnina

**Tað var mest sum undantaksstøða í Havnini, tá skotar av álvara settu seg á býarmyndina mikudagin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talið av kiltum í býarmyndini hevur verið alsamt vaksandi seinastu dagarnar, og nú dystardagur er, hava skotarnir veruliga sveiggjað seg upp.

Tíðliga mikudagin høvdu teir mest sum hersett Tinghúsvøllin, har eitt stórt flagg varð breitt yvir svørðin, og so kundi gamli Rasmus illa gera annað enn bara hyggja.

Og eisini við Hotel Tórshavn høvdu teir gjørt greitt, hvør hevði valdið í býnum, tá ein risa landsliðstroyggja varð fest á bygningin.

Jón Klein Olsen, varapolitiinspektørur sigur, at hóast skotarnir eru bæði nógvir og kátir, so hava teir uppført seg øgiliga pent og eru fittir og fyrikomandi allir sum ein.

## Liðini

**Føroyar**

| Navn | Felag | Dystir/mál |
|---|---|---|
| **Málverjar** | | |
| Jákup Mikkelsen | B36 | 49/0 |
| Meinhardt Joensen | KÍ | 0/0 |
| **Verja** | | |
| Óli Johannesen | TB | 81/1 |
| Atli Danielsen | Frem | 20/0 |
| Marni Djurhuus | EB/S | 5/0 |
| Jón Rói Jacobsen | AaB | 26/0 |
| Rasmus Nolsøe | HB | 1/0 |
| Mortan úr Hørg | HB | 5/0 |
| Pauli G. Hansen | Skála | 5/0 |
| **Miðvøllur** | | |
| Súni Olsen | AaB | 27/1 |
| Mikkjal Thomassen | B36 | 5/0 |
| Jákup á Borg | HB | 50/2 |
| Rógvi Jacobsen | HB | 43/8 |
| Símun Samuelsen | Keflavík | 10/1 |
| Bergur Midjord | B36 | 0/0 |
| Kári Nielsen | HB | 6/0 |
| Fróði Benjaminsen | B36 | 42/2 |
| **Álop** | | |
| Andrew av Fløtum | Fremad A. | 22/1 |
| Christian L. Holst | Lyngby | 5/0 |
| Christian Høgni Jacobsen | HB | 34/2 |
| Hjalgrím Elttør | NSÍ | 13/0 |

**Skotland**

| Navn | Felag | Dystir/mál |
|---|---|---|
| **Málverjar** | | |
| Craig Gordon | Hearts | 22/0 |
| Jamie Langfield | Aberdeen | 0/0 |
| Allan McGregor | Rangers | 1/0 |
| **Verja** | | |
| Graham Alexander | Preston NE | 29/0 |
| Gary Caldwell | Celtic | 24/2 |
| Christian Dailly | West Ham | 65/6 |
| Alan Hutton | Rangers | 1/0 |
| Jay McEveley | Derby | 0/0 |
| Stephen McManus | Celtic | 4/0 |
| Gary Naysmith | Everton | 35/1 |
| David Weir | Rangers | 55/1 |
| **Miðvøllur** | | |
| Charlie Adam | Rangers | 1/0 |
| Barry Ferguson | Rangers | 38/2 |
| Darren Fletcher | Man. Utd. | 28/4 |
| Paul Hartley | Celtic | 14/1 |
| Lee McCulloch | Wigan | 11/0 |
| Gary Teale | Derby | 6/0 |
| **Álop** | | |
| Kris Boyd | Rangers | 8/5 |
| Shaun Maloney | Aston Villa | 5/0 |
| Steven Naismith | Kilmarnock | 0/0 |
| Garryt O'Connor | Lokom. Moskva | 11/4 |